# Tunlarnir verða nú viðgjørdir í landsstýrinum

**Landsstýrismaðurin í samferðslumálum ætlar, at stigtakararnir til Skálafjarðartunlarnar í næstu viku skulu greiða øllum landsstýrinum frá ætlanini, og hann vónar, at uppskot um verklagslóg kann leggjast fyri tingið undan síðsta framløgudegi fyrst í mars 2006**

SKÁLAFJARÐAR-TUNLARNIR
*Jóannes Hansen*

Um støðið verður tikið í nyttu og kostnaðar kanning, so er eingin ivi. Hetta er tann ætlanin, sum hevur loyst seg best av øllum møguleikum fyri samferðsluútbyggingum, sum hava verið viðgjørdar av umsitingarliga og politiska myndugleikanum.

Hetta var niðurstøðan hjá landsstýrismanninum í samferðslumálum, Bjarna Djurholm, tá ið hann mánakvøldið á stórum almennum fundi á Svangaskarði, tók saman um, eftir at stigtakararnir høvdu lagt ætlanina fram.

Nú eru tað nakrar vikur síðani, at stigtakararnir fyrstu ferð greiddu landsstýrismanninum frá ætlanina at gera undirsjóvartunlar tvørtur um Skálafjørðin og av Skálafjørðinum og suður í Suðurstreymoy. Í dag, týsdagin, skuldi Bjarni Djurholm fyri fyrstu ferð leggja ætlanina fram á landsstýrisfundi.

- Vit hava sjálvandi prátað um ætlanina, sum jú hevur verið alment kend í eina tíð. Men landsstýrið hevur ongantíð í felag viðgjørt projektið. Ætlanin hevur verið, at stigtakararnir í morgin, mikudagin, skuldu leggja fram fyri landsstýrið á sama hátt, sum teir hava gjørt á fundinum her á Svangaskarði. Fundurin er nú útsettur inntil í næstu viku, men tá verður hann vónandi hildin, sigur Bjarni Djurholm.

**Bólturin hjá landsstýrinum**

Í síni framløgu løgdu stigtakararnir upp til, at bólturin nú liggur hjá landsstýrismanninum. Kommununar og Kaupthing hava givið til kennar, at tey eru sinnað at vera við, men tað ber ikki til at fara víðari við fyrireikingunum, fyrrenn landspolitiski myndugleikin hevur givið sítt sjónarmið til kennar.

- Talan er um stóra ætlan, sum kostar nógvar pengar, og tí mugu nógvar kanningar gerast. Tað er sjálvsagt, at hetta skal samskipast við allar aðrar samferðsluætlanir og íløgur. Harafturat er spurningurin um tað almenna skal gera arbeiðið, um teir, sum higartil hava arbeitt við hesum, skulu halda fram, ella um loyvið skal bjóðast út at gera fyrireikingarnar. Í løtuni tykist tað óhugsandi, at talan skal gerast um alment partafelag. Landskassin stendur fyri risa stórum íløgum á samferðsluøkinum. Tosað verður um tunnil undir Skopunarfjørð, sum verður mettur at kosta eina hálva milliard. Í tí førinum verður talan bara um almennar pengar, tí tað eru ongar vánir fyri, at privat skulu seta pengar í fyri at fáa ta íløguna forrentaða, staðfesti landsstýrismaðurin, sum tóktist hella mest til, at talan verður um privat felag.

- Tað eru fyrimunir og vansar við øllum møguleikunum, men vit í vinnumálaráðnum ætla at halda fram at samskifta við teir, sum standa aftanfyri hesa ætlanina, sum verður mett høgt í umsitingini - bæði tekniskt og fíggjarliga.

Hóast tað eftir øllum at døma verður soleiðis, at tað almenna ongar pengar fer at játta til tunnilsætlanina á Skálafjørðinum, so er ætlanin, at málið skal leggjast fyri Løgtingið at taka støðu til.

- Talan er um størstu samferðsluíløguna nakrantíð, og tí hevði tað verið undarligt, um Løgtingið ikki viðgjørdi málið. Eg vóni, at fyrireikingarnar fara at ganga so mikið skjótt, at tað fer at bera til at fara í Løgtingið við uppskoti um verklagslóg, áðrenn síðsta freist fyri at leggja lógaruppskot fram í hesum politiska árinum verður farin. Tað er 3. mars. Um alt gongur væl, so er tað ikki veruleikafjart at rokna við tí møguleikanum, heldur landsstýrismaðurin, sum fer at seta seg í sambandi við fyrireikararnar aftur, tá ið málið er viðgjørt í landsstýrinum.

Í lógaruppskotinum fer



*- Tað eru fyrimunir og vansar við øllum møguleikunum, men vit í vinnumálaráðnum ætla at halda fram at samskifta við teir, sum standa aftanfyri hesa ætlanina, staðfestir Bjarni Djurholm*
*Mynd: Vilmund*

# Allir føroyingar skulu eiga tunlarnar

**Kaupthing hevur sett seks milliónir í tunnilsætlanina, og teir fara at bjóða øllum føroyingum at seta pengar í íløgu, sum tað verður roknað við fer at bera seg**

SKÁLAFJARÐAR-TUNLARNIR
*Jóannes Hansen*

Higartil hava Nes kommuna, Sjóvar kommuna og Runavíkar kommuna rindað hundrað túsund krónur fyri tað fyrireikingararbeiðið, sum er gjørt í sambandi við tunnilsætlanina á Skálafjørðinum.

Nú er brúk fyri fleiri pengum, og Kaupthing hevur bjóðað seg fram.

- Vit skrivaðu til allar teir føroysku fíggingarstovnarnar og til Kaupthing og Íslands bankan. Teir báðir síðst nevndu svaraðu. Í báðum førum var talan um áhugaverd tilboð, og vit hava gjørt av at samstarva við Kaupthing, upplýsti Ingi Højgaard, ein av stigtakarunum, á fundinum á Svangaskarði mánakvøldið.

- Kaupthing hevur sett seks milliónir av til ætlanina. Felag verður ikki stovnað, fyrrenn tað verður greitt, um ætlanin verður til nakað sambært uppleggið, sum nú er á borðinum. Kaupthing ætlar sær bara ein lim í nevndini. Fýra skulu tær tríggjar kommunurnar eiga - ein úr Sjóvar og ein úr Nes kommunu - og tveir úr Runavíkar kommunu. Fyrireikararnir skulu so eiga ein lim.

Kristian Petersen frá Kaupthing segði á fundinum á Svangaskarði, at teir meta ætlanina at vera rættuliga spennandi og at vera fíggjarliga heilt realistiska.

- Um ella tá ið ætlanin verður veruleiki, so fara vit at bjóða øllum føroyingum at seta pengar í felagið, ið verður stovnað. Útrokningarnar siga, at tað eigur at fara at loysa seg at seta pengar í felagið. Tað, sum ikki verður eginpeningur, verður neyðugt at fáa til vega við lánsfígging, og tá fara vit í Kaupthing at bjóða okkum fram sum lánsveitara, segði Kristian Petersen.

Hvør skal gera arbeiðið er ikki greitt. Um tað verður hetta her nevnda felagið, sum fær konsessiónina, so fara teir at bjóða arbeiðið út, ella fara teir møguliga í samráðingar við felag ella feløg, sum hava royndir í tunnilsarbeiðum av hesum slagnum.



*Kristian Petersen, leiðari á útlánunum hjá Kaupthing, segði, at teir meta ætlanina sum bæði spennandi og realistiska*
*Mynd: Vilmund*

Símun Johannesen, limur í fyrireikingarbólkinum, undirstrikaði, at grundarlagið, sum teir hava arbeitt eftir, er, at talan skal vera um ætlan, ið skal bera seg fíggjarliga.

- Tá ið vit hava fundast við kommunurnar, so hevur aftur og aftur verið frammi, at sambandið tvørtur um fjørðin er ikki minni týdningarmikið, enn sambandið suðureftir er tað. Men samstundis er veruleikin soleiðis, at tað ikki ber til at gera arbeiðið, um tað ikki ber seg út frá handilsligum treytum. Verkætlanin kappast við farleiðina, sum er umvegis Norðskálatunnilin og Sundalagið. Um prísurin tann vegin fer at verða lægri, enn hann verður í undirsjóvartunnlinum, so fer fíggjarliga grundarlagið undir ætlanini at detta burtur. Hesin veruleikin er drívmegin undir ætlanini, staðfestir Símun Johannesen.

Hesi trý árini, sum fyrireikingarbólkurin hevur arbeitt, hava teir eitt nú verið í sambandi við og havt vitjan frá pf. Spølur, sum rekur undirsjóvartunnilin undir Hvalfirði í Íslandi, og teir hava eisini havt samband við norskan ráðgeva, sum hevur við Norðoyatunnilin at gera.